## Ætlaði at brenna skúlan niður

Ein av næmingunum á Fjordskolen, ið hevði serliga stórar trupulleikar, boðaði ein dagin frá, at hann ætlaði sær at seta eld á skúlan í vikuskiftinum. Hetta var sjálvandi ein álvarslig hóttan, serliga tí her var ikki bert talan um ein skúla, men um heimið hjá Ingvaldi, konu hansara og børnum hansara. Men ístaðin fyri at øsa seg, spurdi Ingvald, hví hann ætlaði at bíða til vikuskiftið, hví hann ikki gjørdi tað sama dag. Hetta hevði næmingurin trupult við at svara. Ingvald spurdi so um hvussu hann ætlaði at gera tað, teir fóru síðan undir eina stóra ætlan um hvussu best kundi setast eld á skúlan, og hvat skuldi gerast fyri, at hetta skuldi eydnast. Eftir eina løtu bakkaði næmingurin út.



Mynd: S.J.

# g riggar ikki



*- Ein av mínum næmingum varð skotin í einum ráni í Ølby. Tá hugsaði eg, nei, nei, nei – kæft, trit og retning riggar ikki. Sigur Ingvald á Kamarinum, ið síðan valdi at stovna sín egna skúla fyri næmingar við trupulleikum.*

*Mynd: Símun Jóannesarson*

trupulleikum. Har treivst eg als ikki, skúlin var rikin for militant til mín. Úrslitið var eisini hareftir; næmingarnir gjørdust harðir og fóru út og løgdu á fólk. Ein av mínum næmingum varð skotin í einum ráni í Ølby. Hann doyði av skotunum og ein annar varð skotin í beini, tá hugsaði eg; nei, nei, nei – kæft, trit og retning riggar ikki, greiðir Ingvald frá.

- Fyrr vandi man politihundar við at buka teir, um teir ikki gjørdu, sum man bað teir. Men hetta er man er frá og er ístaðin farin at spæla við teir. Hetta kann eisini brúkast til børnini, tey læra gjøgnum spæl, sigur hann.

### Vildi hava fulla stýring

Ingvald varð biðin um at vera leiðari á eini skipsverkætlan, har ung við øðrum etniskum uppruna enn donskum vórðu tikin umborð á skip. Hetta var ikki líka harðrent, men sera torført arbeiði. Hóast Ingvald var leiðari á verkætlanini, hevði hann ikki fulla stýring og tað vildi hann hava.

- Tey sum arbeiða við børnunum eiga at hava fulla stýring, hvørt barn hevur ymiskar tørvir, og teir tørvir kenna bert tey sum arbeiða við barninum. Tað var við hesum í huga, at Ingvald tók seg burturúr skipsverkætlanini og fór undir Fjordskolen. Ein skúli har hann er leiðari, og í samstarvi við hinum starvsfólkinum á skúlanum tekur allar avgerðir. Tey eru fýra fólk 2 pedagogar og 2 lærarar, ið eru um børnini alla tíðina, børnini skulu kenna seg trygg, og hava tey somu vaksnu rundan um seg.

### Styrkir ikki veikleikar

Skúlin byggir á grundhugsjónina, at ikki fokusera uppá trupulleikar og veikleikar, men í staðin leggja dent á styrkirnar hjá barninum.

- Eg ringi ongantíð heim til foreldrini hjá barninum og tosi um at vit hava trupulleikar av ein hvørjum slag. Men ístaðin ringi eg heim og tosi um hvat gongur væl, og hvørjar styrkir barnið hevur, greiður hann frá.

### Kennir seg sjálvan aftur

Tá tú tosar við Ingvald er greitt, at honum dámar sítt arbeiði. Sosial pedagogikkin valdi hann, eftir at hann flutti til Danmarkar, tá kreppan herjaði í Føroyum. Ingvald hevði roynt seg innan ymiskar vinnugreinar, m.a. sum myndamaður og sjómaður. Hann hevði einans 7. flokk, og tá hann kom til Danmarkar byrjaði hann á berum. Hann tók skúlagongdina frá 8. flokki til HF í eini serliga intensivari útgávu yvir tvey ár, síðan fór hann undir læruna sum sosial pedagog.

- Eg minnist, at tá eg fór til skips 14 ára gamal, tá føldi eg, at eg var verdur. Eg treivst ikki serliga væl í skúlanum. Fólk skulu vita, at tey duga okkurt, og tað er tað, sum eg vil hava mínar næmingar at føla, akkurát sum eg føldi, tá eg fór til skips.

### Hava rættan rygg

Á Fjordskolen verður dentur lagdur á, at børnini ikki skulu kenna seg, sum um tey eru vrakaði og endaði á onkrum serskúla, tí tey ikki passa inn. Hetta verður gjørt við, at tey læra ymiskt, ið tú ikki lærir í vanliga fólkaskúlanum, og at tey fáa upplivingar, ið tey ikki høvdu fingið aðrastaðni. Eitt nú eigur Fjordskolen ein sera stásiligan seglbát, ein reyðan skjóttgangandi gummibát, jollur, vatnskíðir. Ingvald greiðir frá, at tey hava syrgt fyri at seglbátur, gummibátur og annað er 1. floks:

- Hesi børnini hava ongantíð upplivað, at nakað er 1. floks, so tí skulu tey her uppliva tað, sigur hann.

- Tá næmingarnir á Fjordskolen ganga niðri á havnarlagnum í vátdrakt, vita teir, at teir duga okkurt, sum flest onnur ikki duga, og ryggurin er øgiliga rættur, greiðir Ingvald frá.

- Tað er týdningarmikið, at næmingarnir vita, at vit hava tey høgt í metum. Vit geva teimum sjálvsvirði, næmingurin skal vita, at hann er okkurt og at onkur leggur í hann. Sjálvsálitið kemur av at duga væl, men tú mást hava sjálvsvirði, tí tað er tað, tú byggir sjálvsálitið á, greiðir Ingvald frá.

### Vóru í Føroyum

Næmingar, pedagogar og lærarar á Fjordskolen vóru í heyst í Føroyum og ferðaðust. Hetta at ferðast saman er eisini ein partur av tí, at skapa jaligar upplivingar fyri næmingarnar, ið teir ikki høvdu uppliva aðrastaðni. Tað er heldur eingin ivi um, at Føroyar hava gjørt stórt inntrykk á teir níggju dreingirnar. Tá vit hitta nakrar teirra uttan fyri skúlan, eru teir skjótir at fortelja um túrin til Føroyar, og hvussu góður hann hevur verið.

### Einki galið við dreingjunum

- Flogternan á veg niður aftur segði, at hon ongantíð hevði havt so fólkalig børn, teir søgdu: Undskyld må vi få